**Hoyringsskriv frá Javna viðvíkjandi uppskoti til dagstovnalóg**

Javni takkar fyri møguleikan at lata hoyringsviðmerkingar til uppskot til dagstovnalóg. Viðmerkingarnar taka støði í arbeiðinum hjá Javna fyri at tryggja, at børn við serligum tørvi og fjølbrek hava javnbjóðis rættindi, tryggleika og atgongd til samanhangandi og haldgóð dagstovna- og frítíðartilboð.

Dagstovnalógin hevur ein heilt avgerandi leiklut í at tryggja, at børn, eisini børn við samansettum og varandi tørvi, verða møtt við skipanum, sum byggja á barnsins besta, fakligar metingar og fyrisigiliga ábyrgd. Samstundis er tað eitt grundleggjandi samfelagsligt mál, at familjur hava møguleika fyri einum fyrisigiligum gerandisdegi og, so langt tað er gjørligt, einari javnari og varandi tilknýti til arbeiðsmarknaðin.

## 1. Small-scale society, serligir vandatættir

Føroyar eru eitt lítið og tætt samfelag, har nógv kenna hvønn annan, eisini familjur, børn og starvsfólk í almennum skipanum. Hetta kann í mongum førum vera ein styrki og leggja lunnar undir nærleika, samhaldsfesti og skjótari hjálp, tá tørvur er á tí. Í einum small-scale society kunnu samskiftisleiðir vera styttri, og tað kann vera lættari at seta tiltøk í verk skjótt.

Samstundis hevur eitt small-scale society eisini serligar avbjóðingar, serliga tá talan er um børn við serligum tørvi. Í einum lítlum samfelagi er torført at vera ókend, og tað kann gera tað truplari hjá familjum at siga frá um trupulleikar ella at biðja um hjálp. Ótti fyri slatri, stempling ella fyri at verða misskilt kann hava við sær, at avbjóðingar verða tagdar burtur ella handfarnar ov seint.

Hetta er serliga álvarsamt fyri børn við serligum tørvi, sum ofta eru treytað av, at onnur vaksin og skipanir taka ábyrgd og handla rættstundis. Um ábyrgdir, mannagongdir og rættindi ikki eru greitt ásett, verður nógv lagt upp til óformellar loysnir og persónligar metingar, sum kunnu vera ymiskar frá staði til stað.

Harumframt kann tann tættari relatiónin millum borgarar, starvsfólk og myndugleikar gera tað truplari at skilja millum persónlig sambond og fakligar metingar. Tað kann elva til, at trupulleikar verða normaliseraðir, ella at atlit verða tikin, sum ikki byggja á fakligar metingar, men á kendleika, kenslur ella lokal siðvenju.

Í einum small-scale society er eisini minni rúm fyri feil. Tá lóggáva gevur stórt rásarúm til lokalar tulkingar, kunnu avleiðingarnar fyri einstøk børn og familjur verða stórar og varandi. Tí eigur lóggáva, sum fevnir um børn og serligan stuðul, at vera serliga greið, bindandi og fakliga grundað.

## 2. Viðmerkingar til § 3, orðingin “kann”

Í § 3 verður ásett, at kommunan *kann* geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni. Orðingin gevur kommununi heimild, men ikki eina greiða skyldu. Hetta hevur eftir meting Javna álvarsligar avleiðingar, serliga fyri børn við serligum tørvi og fjølbrek.

Tá rætturin til dagstovnatilboð ikki er bindandi, verður atgongdin treytað av lokalum metingum, figgjarkørmum og verandi siðvenju í kommununi. Í praksis merkir hetta, at kommunur kunnu raðfesta ymist, bæði tá tað kemur til inntøku av børnum, støðufesti í tilboðum og umfatandi stuðul.

Hetta kann elva til ójavna millum kommunur og til, at børn við størstan tørv eru tey, sum standa veikast. Í einum landi sum Føroyum, við fáum íbúgvum og stórum munum millum kommunur, kann hetta í praksis elva til eina skipan, sum líkist tí, sum í øðrum londum verður kallað eitt kommunalt “lotteri”, har tilboð og viðgerð verða ymisk eftir bústaði heldur enn eftir tørvi barnsins.

Javni vil í hesum sambandi vísa á, at børn við fjølbrek ofta eru knýtt at øðrum almennum stuðulsskipanum og tí ikki altíð verða roknað sum partur av vanliga kommunala dagstovnatilboðnum. Í slíkum førum fáa børnini ikki eitt dagstovnatilboð, sum í umfangi, innihaldi og støðufesti samsvarar við eitt vanligt barnagarðstilboð. Hetta kann gerast enn meira útbreitt, við orðingini ”kann”.

## 3. Støðufesti, flytingar og isolatión

Javni hevur í fleiri førum verið í sambandi við foreldur, sum hava greitt frá, at teirra børn við serligum tørvi hava upplivað manglandi støðufesti í dagstovnatilboðnum. Foreldur hava m.a. upplýst, at børn eru flutt millum ymiskar stovur innan sama dagstovn og, í summum førum, eisini flutt millum ymiskar dagstovnar.

Flytingarnar eru ofta grundaðar í skipanarligum, manningarligum og fakligum viðurskiftum, herundir manglandi vitan og serførleikum á økinum hjá kommunum og stovnum, heldur enn í ítøkiliga tørvinum hjá barninum. Slíkar broytingar kunnu vera sera krevjandi fyri børn við serligum tørvi, sum hava stóran tørv á kendum umhvørvi, støðufesti og varandi, kendar relatiónir. Í praksis kann hetta føra til eitt ójavnt og óskipað tilboð, har innihaldið í gerandisdegnum hjá barninum í stóran mun verður treytað av einstakari orku, vitan og royndum hjá tí starvsfólki, sum er á vakt viðkomandi dagin.

Í einstøkum førum hevur Javni eisini fingið frágreiðingar um støður, har børn hava verið tikin úr felagsskapinum við onnur børn og í styttri ella longri tíð verið einsamøll á stovni ella á stovu. Slíkar loysnir eru sera álvarsamar, tí tær stríða ímóti grundleggjandi prinsippum um inklusjón, trivnað og menning hjá børnum.

**4. Stovnsgjald og støðan hjá foreldrum**

Javni vil harumframt vísa á, at foreldur at børnum við brek gjalda fult stovnsgjald, eisini í støðum har barnið ikki hevur møguleika at nýta dagstovnatilboðið í fullum umfangi. Javni veit at siga frá fleiri førum, har børn í longri tíðir ikki eru á stovni vegna sjúku, viðgerðir ella onnur heilsulig viðurskifti.

Í summum førum eru børnini bert knýtt at stovninum við sera skerdum tímum, til dømis 1–2 tímar um dagin. Í hesum støðum fáa foreldur ikki ta tænastu, sum tey gjalda fyri, hóast stovnsgjaldið verður kravt óbroytt.

Hetta setur foreldur í eina sera torføra støðu, bæði fíggjarliga og arbeiðsliga. Avmarkaða tilknýti til dagstovnatilboð ger tað trupult, og í summum førum ómøguligt, hjá foreldrum at hava fast og varandi tilknýti til arbeiðsmarknaðin. Av somu orsøk enda fleiri foreldur við at søkja um endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku.

**5. Viðmerkingar til § 3 a, frítíðarstovnar og upplatingartíðir**

Við nýggju § 3 a verður ásett, at frítíðarstovnar hava opið eftir loknan skúladag. Javni metir, at henda áseting hevur stórar avleiðingar fyri familjur við børnum, serliga tá frítíðarstovnar í praksis hava verið stongdir í longum skúlaferiunum.

Javni vil her vísa á, at Løgtingsins umboðsmaður í 2023 staðfesti, at dagstovnalógin á hesum øki hevði verið praktiserað skeivt, og at frítíðarstovnar skuldu fylgja dagstovnaskipanini heldur enn skúlaskipanini og at henda skipanin skuldi endurskoðast við júst hesari dagstovnalóg, men hetta sæst ikki aftir í lógaruppskotinum. Í niðurstøðuni varð eisini ávarað ímóti ov stórum kommunalum rásarúmi.

**6. Aldursmark, ábyrgd og sertørvisøkið**

Í lógaruppskotinum verður ásett, at frítíðarstovnar eru ætlaðir børnum til og við 2. flokk. Javni metir, at hetta ikki í nóg stóran mun tekur hædd fyri, at børn við serligum tørvi ofta hava brúk fyri frítíðartilboði longur enn hetta.

Tá ábyrgdin eftir 2. flokk ikki er greitt ásett, er vandi fyri, at børn detta millum skipanir, og at tilboð verða treytað av lokalum loysnum.

**7. Sernámsfrøðilig ráðgeving og faklig orka**

Í lógaruppskotinum verður lagt til grund, at sernámsfrøðilig ráðgeving longu verður veitt sambært verandi praksis, og at eingin eyka útreiðsla verður væntað. Hetta metir Javni ikki samsvara við veruliga støðuna.

Sernám hevur bíðitíðir á fleiri sernámsfrøðiligum og terapeutiskum økjum, serliga innan samskifti. Manglandi faklig orka merkir í praksis, at ikki øll børn fáa ta stuðul, sum er ein grundleggjandi treyt fyri menning, trivnað og sosiala luttøku.

**Niðurstøða**

Samlað metir Javni, at lógaruppskotið, við sínum veiku orðingum og stóra rásarúmi til kommunalar tulkingar, ber við sær ein vanda fyri, at tilboð og rættindi hjá børnum verða ymisk eftir, hvar í landinum tey búgva. Hetta kann í praksis elva til ójavna, har atgongd til stuðul og viðgerð verður treytað av kommunalum raðfestingum og fíggjarkørmum, heldur enn av tørvinum hjá barninum.

Í einum small-scale society er hetta serliga álvarsamt. Javni metir tí, at lóggávan eigur at tryggja greiðar, bindandi og javnbjóðis karmar, við barnsins besta sum leiðandi grundarlagi.